## Onki avgjørt

Annika Olsen sigur í heilt stuttari viðmerking, at tað, sum er sent kommununum, er ikki nakað endaligt, tí enn eru tey í eini tilgongd.

Enn er onki endaliga avgjørt, tí nú bíðar hon eftir, at tey bæði kommunufeløgini siga sína hugsan um málið og so verður arbeitt haðani frá.

- Tað, sum vit nú samskifta við tey bæði kommunufeløgini um, er, hvussu vit kunnu tryggja eina fólksliga tilgongd.

Ein spurningur í hesum sambandi er um talan skal vera um fólkaatkvøður og, hvussu tær skulu skipast.

Men hon væntar, at verður fólkaatkvøða, verða kommunurnar fleiri enn tær níggju í tali, sum ætlanin er.

Hinvegin er heldur onki endaliga avgjørt um, hvussu samstarv ímillum kommunurnar skal skipast, men hon leggur afturat, at nógv bendir á, at ein kommununa sum Vág, ikki hevur orku til at átaka sær nakrar serligar uppgávur, verða ymisk øki flutt undir kommunurnar at umsitast.

# Vágbingar vilja ikki tvingast í hjúnaband

**KOMMUNUSAMANLEGGING** Býráðslimir í Vági eru alt annað enn foreintir við ætlanina hjá samgonguni um at leggja kommunur saman

Áki Bertholdsen

- Hetta minnir mest um tvey, sum verða tvingað at ganga saman í hjúnaband.

Hetta skoðsmálið fær ætlanin hjá samgonguni um at nýskipa kommunu-bygnaðin á fundi í Vágs Býráði.

Býráðið hevur viðgjørt ætlanina, men býráðslimir halda, at hon er so ógreið, at málið má lýsast nógv neyvari, áðrenn býráðið kann taka støðu.

Ætlanin hjá samgonguni er at leggja kommunurnar saman, so at tær verða færri, men størri og sterkari og samstundis samstundis verður eldraøkið nevnt sum eitt dømi um eitt málsøki, sum skal leggjast undir kommunurnar at umsitast.

Men býráðslimir í Vági halda, at tað er alt ov lítið kjøt á enn, tí enn er ógreitt, akkurát, hvat samgongan ætlar og akkurát hvørji málsøki skulu leggjast undir kommunurnar at umsitast.

Í skrivi, sum er sent kommununum staðfestir landsstýriskvinnan í innlendismálum, at endamálið er, at kommunurnar skulu vera størri og sterkari.

Men býráðslimir í Vági staðfesta, at samstundis er ætlanin at Vestmanna og Kvívík skulu verða ein kommuna, og Sandoy og Skúvoy í eina kommunu.

- Men tær kommunurnar verða ikki størri enn Vágs kommuna er nú og í øllum førum verða tær væl minni enn Suðuroyar syðra helvt.

- Hinvegin er ætlanin at Suðuroy kann verða ein kommuna, hóast tað er alkunnugt, at semja er ikki um tað.

Býráðslimir í Vági skilja ikki, hví Suðuroy ikki kann verða tvær kommunur, ella hví Vágur ikki kann vera fyri seg sjálvan, tá ið aðrar kommunur, sum er minni enn tað, verða góðtiknar og verðar mettar at vera nóg sterkar til at átaka sær fleiri uppgávur.

- Klára Vestmanna og Kvívík og Klára Sandoy g Skúvoy at umsita eitt málsøki, klárar Vágs Kommuna tað eisini einsamøll, halda býráðslimir í Vági.

**Tey, sum ikki vilja sjálvi, skulu tvingast**




*Samgongan hevur boðað frá, at broytingin í kommunubygnaðinum skal vera so fólkslig sum gjørligt, men býráðslimir í Vági halda ikki, at tað er serliga fólksligt at tvinga kommunur at samstarva. Myndina tók Erik Christensen*

### Tvingsil

Í upplegginum, sum Innlendismálaráðið hevur sent Vágs Býráði, sigur Annika Olsen, at fólkaatkvøða um málið skal vera í teimum einstøku kommununum.

Tær kommunur, sum siga nei, skulu eisini sleppa frá at leggja saman.

Men tær verða kortini tvingaðar í eitt samstarv við hinar kommunurnar í økjunum. Tað er enntá ætlanin at staðfesta hetta samstarvið við lóg og har verður eisini ásett við lóg, at kommunurnar skulu rinda eftir fólkatalinum.

Býráðslimir í Vági halda, at hetta er sum at tvinga fólk saman í hjúnaband.

Teir sakna eisini eina ítøkiliga ætlan fyri, hvussu tey fíggjarligu viðurskiftini skulu skipast, fáa kommunurnar fleiri málsøki at umsita.

# Løgmaður skal sita á kassanum

**AÐALRÁÐ** Formaðurin í Fólkaflokkinum heldur, at tað er nóg mikið, at landsstýrið er mannað við trimum fólkum, ístaðin fyri við átta fólkum, sum tað eru nú.

Áki Bertholdsen

- Almenn kongsríki skulu leggjast saman.

Tað var ein boðskapur hjá Jørgen Niclasen, formanni Fólkafloksins, á kvøldsetu í Øravík fyrr í vikuni.

Og hann heldur, at tað er rættast at byrja í toppinum og at leggja aðalráðini saman, so at vit fáa eina minni umisiting og færri landsstýrisfólk.

Seinastu tíðina hevur nógv verið tosað um at klippa oman av almennu fyrisitingini og formaðurin í Fólkaflokkinum hevur eisini eitt boð upp á, hvussu tað kann gerast.

### Trý er tað besta

Í løtuni eru níggju aðalráð og átta landsstýrisfólk, eftir at Jørgen Niclasen fór frá sum uttanríkisráðharri so at Jacob Vestergaard nú er landsstýrismaður fyri bæði fiskivinnu og uttanríkismál.

Men Jørgen Niclasen kundi hugsa sær, at vit fara heilt niður á trý aðalráð og trý landsstýrisfólk, har vit hava ein løgmann, men hann skal eisini vera landsstýrismaður í fíggjarmálum.

Harafturat skulu vit hava eitt landsstýrisfólk, sum umsitur vinnumál, útflutningsmál og øll onnur málsøki, sum hava við vinnulív og privata búskapin at gera.

- Men so skulu vit eisini hava eitt landsstýrisfólk, sum umsitur útreiðslupartin í fíggjarlógini, tað vil siga, tann almenna partin partin av búskapinum.

### Løgmaður á kassan

Kortini ásannar Jørgen Niclasen, at tað, sum mest verður tosað um nú, er, at vit skulu hava seks aðalráð og seks landsstýrisfólk.

Men undir øllum umstøðum skal skipanin vera so, at løgmaður eisini umsitur fíggjarmál.

Hann hevur ikki útgreinað út í æsir, hvussu aðalráðini skulu skipast.

- Eg sakni, at tað er betri skil í. Og fyri at bøta um tað, heldur Jørgen Niclasen í hvussu so er, at tann, sum situr í landsins hægsta embæti, løgmanssessinum, skal eisini at sita á kassanum.

- Sostatt eigur løgmaður eisini at umsita fíggjarmál, tí tað er ígjøgnum tann fíggjarliga partin, at tað ordiliga ber til at stýra og samskipa øll ráðini.

Hetta er ein skipan, tey hava í Liktinstein, sum er ein pinkutjóð, og í Bretlandi er forsætisráðharrin eisini ovasti myndugleikin yvir fíggjarlógini.

### Fótur í hosu

Annars heldur Jørgen Niclasen, at privati parturin av búskapinum eigur at hava tvey landsstýrisfólk.

Í hesum sambandi heldur hann, at uttanríkismál og fiskivinnumál passa saman sum fótur í hosu.

Men tosa vit um vinnuliga partin av fíggjarlógini, eru skattir og avgjøld ein rættiliga týðandi partur og sostatt eigur landsstýrisfólki í vinnumálum eisini at umsita skatta- og avgjaldsmál.

- Soleiðis tryggja vit best, at vinnan fær hóskandi karmar at virka undir, sum gevir henni menningarmøguleikar.

Hinvegin eiga heilsu- og almannamál at liggja undir landsstýrisfólkinum í innlendismálum, heldur Jørgen Niclasen.

*aki@sosialurin.fo*